Starvslýsing

Meginskrivstovan

## KT-fólk til Nærverkið

**Kundi tú hugsað tær eitt avbjóðandi KT-starv í eini fyritøku í stórari menning?**

Tú kemur í samband við nógv fólk og arbeiðsdagurin hjá tær verður fjølbroyttur. Tú fært stóra ávirkan á egnan arbeiðsdag og sleppur at brúka og menna teg fakliga.

Er hetta nakað fyri teg, ella hevur tú spurningar til starvið, kanst tú seta teg í samband við Jacob Horn Nielsen á telefon 761002 ella við at senda teldupost til jacobn@naerverk.fo.

Umsókn við avriti av viðkomandi prógvum skal sendast til:

Nærverkið
Stílað: Jacob Horn Nielsen
Argjavegur 26
Postsmoga 3037
110 Tórshavn
naerverk@naerverk.fo

**Umsóknarfreist: 2. oktober 2009.**

**Les alla lýsingina á heimasíðu okkara www.naerverk.fo / leys størv**

Nærverkið veitir tænastur til borgarar við serligum tørvi, sum búgva heima, á bústovnum ella á sambýlum. Vit skapa møguleikar fyri lívsgóðsku við støði í tørvi og førleika hjá tí einstaka. Okkara eyðkenni er, at starvsfólkið leggur dent á professionalismu, dygd og nærleika. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almannamálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru tríggjar deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan og Stuðulstænastan. Umleið 1400 fólk starvast í Nærverkinum.

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan · Postsmoga 3037 · 110 Tórshavn · Tel 36 00 00 · Faks 36 00 01 · meginskrivstovan@naerverk.fo

www.naerverk.fo

Sosialurin FØROYABANKI

Leygardagin 12. september kl. 16.00

# Fyrilestur í Miðlahúsinum um MASS ANDRIAS WINTHER

**ÆTTARBANDIÐ er eitt felag fyri ættargranskarar. Á hvørjum ári hevur felagið havt almennar fundir um ávísar søguligar persónar.**

Við tað at Tórshavnar kommuna fyllir 100 ár, hevur nevnd felagsins gjørt av, at hava fyrilestur um fyrsta býráðsformannin í Havn, Mass Andrias Winther (1871-1923)

Mass Andrias Winther og Jóhan Hendrik Poulsen vóru teir í skipaðu fyri fyrsta fólkafundinum í Føroyum, hetta var 14.05.1894. Hann kom uppí politik, og saman við øðrum íbirti hann í 1903, fyrsta veljarafelagið í Føroyum, Føroya Framburðsfelag.

Tá ið nýggja býráðslógin kom í gildi í 1908, var M. A. Winther valdur á listanum hjá hesum sama felag og gjørdist hann soleiðis fyrsti býráðsformaður í Havn.

Tað verður Ólavur Clementsen sum fer at hava fyrilestur um Mass Andrias Winther í Miðlahúsinum í Havn, leygardagin 12. september kl.16.00.

**Í nevndini í Ættarbandinum eru:**
Maria Jacobsen, Glyvrar, formaður
Elin Midjord, Tórshavn, næstformaður
Jóna Lindenskov, Tórshavn, skrivari
Katrin Mørkøre, Eiði, kassameistari
Andras Joensen, Tórshavn, nevndarlimur




miðlahúsið í Vágsbotni

STARVSLÝSING

## Kunningarfólk við løttum og skjótum penni til kunningardeildina á Landsverki

Landsverk søkir eftir kunningarfólki at byrja skjótast gjørligt.

**Arbeiðsuppgávur**

Í tøttum samstarvi við kunningarráðgevan og stjóran fevnir starvið í høvuðsheitum um at skapa opinleika og vitan um dagliga virksemið hjá Landsverki og soleiðis tryggja, at fólk fáa møguleikan at fylgja við og samstundis fáa eina greiða mynd av stovninum. Tú kemur at arbeiða fyri einum konstruktivum samstarvi við fjølmiðlarnar og skalt tryggja, at Landsverk altíð er til reiðar at veita fjølmiðlunum tær upplýsingar og tað tilfar, ið teimum tørvar.

Arbeiðið fevnir í høvuðsheitum um skriviuppgávur, til dømis uttan- og innanhýsis kunningarskriv. Eisini kundu vit hugsa okkum, at tú í tøttum samstarvi við kunningarráðgevan verður við í menningini av innan- og uttanhýsis heimasíðuni hjá okkum.

Talan er um eitt starv við spennandi avbjóðingum, har tú hevur góðar møguleikar fyri persónligari og fakligari menning.

Tú vísir beinleiðis til stjóran.

**Førleikakrøv**

Tú ert útbúgvin journalistur ella hevur líknandi útbúgving. Starvsroyndir frá útvarpi, sjónvarpi ella tíðindablaði er ein fyrimunur.

Undir øllum umstøðum er pennurin hjá tær bæði léttur og skjótur.

Harafturat hevur tú eitt gott hugflog og dugir at fanga ta áhugaverdu søguna.

Vit vænta, at tú ert arbeiðssamur, hevur góð samstarvsevni, dugir at arbeiða miðvíst, sjálvstøðugt og ábyrgdafult, og at tú ert til reiðar at royna nýggjar avbjóðingar. Góður KT-kunnleiki er ein treyt.

**Setanarviðurskifti**

Løn og setanartreytir annars eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag. Talan er um eitt hálvtíðarstarv.

**Umsóknir**

Umsókn við prógvum og lívsgongdarlýsing (cv) verður send til lv@lv.fo ella:

Landsverk,
Postsmoga 78,
FO-110 Tórshavn,

og skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 18. september 2009 kl. 12.00. Merk umsóknina „Umsókn til kunningardeildina.“ Vinarliga viðmerk í umsóknini, hvar tú hevur sæð starvslýsingina. Fleiri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Oyvind Brimnes, stjóra, á tel. 540 801 ella ob@lv.fo

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn, | Tel 340 800, Faks 340 801, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK *byggir land*

*Landsverk er stovnur undir Innlendismálaráðnum og hevur um hendi vega- og havnamyndugleikauppgávur og byggiharrauppgávur. Stovnurin ráðleggur og ger ætlanir, útinnir, rekur og viðlíkaheldur landsvegir, havnir, bygningar og flogvøllir, herundir tyrlupallar.*

# Haldið Sosialin!



Verður sent ópostað. Sosialurin rindar postgjaldið

64

**Ja takk!** Eg ynski at tekna meg sum haldara av Sosialinum, og fái blaðið borið út 5 ferðir um vikuna

**Tekna teg sum haldara nú fyri einans**
**495,- um ársfjórðingin**
**Sparið 560,- í mun til leysasølu!**

Navn:

Bústaður:

Bygd / býur:

Telefon:

Undirskrift:

**Send lepan til:**

Sosialurin
Boks 76
FO-110 Tórshavn